# HF-næmingur tikin í at snýta til próvtøku



*Ólógligir lepar til eina próvtøku í støddfrøði kostaðu fríggjadagin einum næmingi í Hoydølum HF-prógvið. Næmingurin var koyrdur úr skúlanum, tá ið hann var tikin í eini roynd at snýta*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Ein næmingur á HF-skeiðnum í Hoydølum var fríggjadagin tikin í at snýta til próvtøkuna í støddfrøði. Rektarin burturvísti næminginum beinanvegin, og næmingurin verður nú koyrdur úr skúlanum**

PRÓVTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ein næmingur á HF-skeiðnum í Hoydølum er koyrdur úr skúlanum, tí hann royndi at snýta til eina próvtøku í støddfrøði fríggjadagin.

Næmingurin hevði við lepum roynt at fingið hjálp til at loysa onkrar av uppgávunum til próvtøkuna, men lærararnir gjørdust varugur við royndina at snýta, og so fall hamarin beinanvegin.

– Tað var staðfest, at næmingurin hevur óregluliga roynt at fingið hjálp undir próvtøkuni, og næmingurin hevur eisini viðurkent hetta. Tí hava vit einki annað val enn at koyra næmingin úr skúlanum, sigur Mads Winther, rektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum.

– Vit hava ikki kunna staðfest, at nakar annar næmingur hevur roynt at hjálpt hesum ávísa næmingi, og tí er tað bara tann eini næmingurin, sum hevur gjørt nakað óregluligt.

### Eingin náði í kunngerðini

Próvtøkukunngerðin er eirindaleys, tá ið tað snýr seg um snýt til próvtøku. Verður tað staðfest, at næmingar hava snýtt ella roynt at snýta, skulu teir koyrast úr skúlanum og sleppa ikki at halda fram. Tað er eingin linari revsing enn at verða tveittur út úr skúlanum.

– Tað var eingin ivi um, at næmingurin hevði roynt at snýtt, og í slíkum førum kunnu vit bara gera eitt, og tað er at koyra hann úr skúlanum, sigur Mads Winther.

– Tað er óvanligt, at næmingar verða tiknir í at snýta til próvtøkur, og hetta er fyrstu ferð í mínum ellivu árum sum rektari, at eg havi verið úti fyri hesum, sigur hann.

Rektarin í Hoydølum hevur sent Mentamálaráðnum bræv um tilburðin og sína avgerð, og næmingurin hevur nú eina viku at svara.

# – Vit høvdu einki annað val

**Lærararnir á datamatikaraútbúgvingini á Handilsskúlanum í Havn hildu seg einki annað val hava enn siga upp. Hetta hóast teir rýmdu frá næmingunum stutt áðrenn endaligu próvtøkurnar**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Datamatikaranæmingarnar á Føroya Handilsskúla í Havn eru komnir í eina trupla støðu. Tey hava fýra mánaðir eftir av skúlagongdini, men nú hava tey ongan lærara.

Teir báðir lærararnir, sum hava undirvíst teimum allatíðina, eru rýmdir av Handilsskúlanum, tí teir siga umstøðurnar verða óforsvarligar til at undirvísa í.

Næmingarnir hava gjørt greitt, at teir halda gomlu lærararnar verða teir bestu til at tryggja dygdina í útbúgvingini, og tí kenna næmingarnir seg ikki tryggir við, at nýggir lærarar skulu taka um endan og føra tey til próvtøku.

### Vánaligar umstøður

Næmingarnir vilja helst hava tykkum at undirvísa teimum og føra tey til próvtøku. Hvussu kunnu tit so rýma av skúlanum júst nú?

– Vit kendu okkum noydd at siga upp, tí vit eru ikki før fyri at lata næmingunum seinastu frálæruna og taka okkum av próvtøkunum. Vit hava havt so vánaligar umstøður, og trýstið hevur verið so stórt, at vit eru ikki før fyri at fyrireika okkum til undirvísingina undir hesum umstøðunum, sigur Jon Jensen, sum er annar av lærarunum, sum hevur sagt upp.

### Kedd av støðuni

Men hvussu hava tit tað við at rýma frá næmingunum beint nú?

– Vit eru sera kedd av tí, og tað plágar okkum nógv. Men vit hava gjørt greitt, at vit rýma ikki undan útbúgvingini ella næmingunum. Vit rýma undan umstøðunum á Handils-skúlanum, sigur Jon Jensen.

– Vit hava roynt at gjørt nakað við støðuna, men vit halda, at tað er bara blivið verri, og tí tóku vit avgerðina um at siga upp.

## MMR avvísir næmingum

**Datamatikaranæmingarnir á Handilsskúlanum í Havn fáa ongan fund við Mentamálaráðið, tí ráðið hevur fult álit á leiðsluni á Handilsskúlanum**

SKÚLASTRÍÐ
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Næmingarnir, sum taka datamatikaraútbúgvingin a á Handilsskúlanum í Havn, fáa ongan fund við Mentamálaráðið um støðuna á skúlanum, eftir at lærararnir hjá teimum hava sagt seg úr starvi.

Næmingarnir kenna seg ikki tryggar við avgerðina, sum leiðslan á Handilsskúlanum hevur tikið um restina av útbúgvingini, og tí vildu tey á tal við Mentamálaráðið um hetta.

Men næmingarnir hava nú fingið svar úr Mentamálaráðnum, har ein fulltrúði boðar teimum frá, at tey fáa ongan fund.

Mentamálaráðið sigur seg vera kunnað um, at skúlin arbeiðir við at finna eina loysn fyri útbúgvingina, og at komið er væl áleiðis við hesum arbeiði.

– Mentamálaráðið heitir tí á tykkum um at venda tykkum til leiðslu skúlans, um tað eru viðurskifti í sambandi við útbúgvingina, sum tit meta skúlin eigur at verða kunnaður um ella sum tit eru í iva um og ynskja útgreinað nærri. Mentamálaráðið hevur álit á, at skúlin finnur eina loysn viðvíkjandi støðuni í teldustøðingaútbúgvingini, stendur at lesa í svarinum til næmingarnar.

Næmingarnir eru ørkymlaðir av svarinum úr Mentamálaráðnum, og tey siga seg nú ikki vita, hvat tey skulu gera.

## Vørpini blivu til Kringvarpið

Landsstýrismaðurin við mentamálum gjørdi mánadagin av, at samanlagdi loftmiðlastovnurin skal eita Kringvarp Føroya.

Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vórðu løgd saman í ein stovn 1. januar í ár, og fleiri nøvn hava verið í uppskoti til samanlagda stovnin. Tí metti leiðslan á stovninum, at rættast var, at politiski myndugleikin tók avgerð um navnið.

Og tað hevur Jógvan á Lakjuni gjørt. Nýggja navnið er Kringvarp Føroya, men tó er ætlanin at gomlu stovnsnøvnini verða varðveitt sum hjánøvn.

**ek**